# EINGIN NOYÐIR HER ÚTI

**UNGDÓMUR** “Altso, heilt erliga, Sólvá: Blívur tú ikki snedig av at búgva einsamøll harúti í Svínoy?”. Henda spurningin hevur 24 ára gamla Sólvá Eyðunsdóttir Jacobsen mangan hoyrt. Tað eru helst uppaftur fleiri ið ikki nenna sær at fornerma hana við einum so nærgangandi spurningi. Tá hon enn einaferð fekk henda spurningin settan av Oyggjablaðnum, fall svarið beinanvegin: - Eg eri kanska eitt sindur spesiell, av tí at eg framvegis búgvi herúti. Men snedig, nei, tað eri eg ikki, tí eingin noyðir meg til tað. Eg búgvi her í Svínoy av fríum vilja, og eg eri ikki flov av at siga, at eg eri svínoyingur!



**HEIMBYGDIN**

*- Tað er altíð okkurt at gera herúti í Svínoy, hóast eg eri yngsta fólkið, sigur Sólvá Eyðunsdóttir*



Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Svínoy:** - Eg búgvi herúti, av teirri einfaldu orsøk at mær dámar at vera her. Um eg ikki tímdi tað ella eg keddi meg her, ja, so kundi eg jú bara flutt onkra aðrastaðni, slær Sólvá fast.

Hon er ein av teimum hepnu, sum hevur eitt lønandi arbeiði í heimbygdini - í hesum føri á nýggju smoltstøðini í Svínoy.

- Nú havi eg arbeiði herúti, so eg havi ongar ætlanir um at fara nakran veg. Eg havi í øllum førum eitt gott lív.

Hvønn einasta dag fer Sólvá til arbeiðis á smoltstøðini sum tey beint nú eru í ferð við at rigga til framleiðslu. Hetta er einasta arbeiðsplássið í bygdini.

Oyggjablaðið hitti hana ein dag í farnu viku, tá hon var farin til hús í døgurðasteðginum. I dagens anledning hevði pápi hennara gjørt ein góðan døgurða - kókað ræst kjøt, soleiðis at arbeiðsdagurin hjá okkum øllum kundi roynast góður.

- Hetta er í fínasta slag, tí tað eru ikki nógvir aðrir møguleikar fyri arbeiði herúti. Tí eri eg her, hóast eg veit, at nógv onnur ikki høvdu gjørt tað sama sum eg.

- Og var einki arbeiði at fáa her, ja, so hevði eg helst arbeitt okkurt í Klaksvík. Eg meini, - man kann ikki ganga fyri einki í ov langa tíð, sigur Sólvá.

Hon ætlar sær einaferð seinni at fáa sær eina útbúgving. Júst hvørja, hevur hon ikki avgjørt enn, men tað verður okkurt sum hon brennur fyri.

- Tú veitst hvussu tað er: Tað eru altíð onnur sum halda seg vita betri enn tú. Men man skal ikki altíð hugsa um, hvat hini halda og siga.

- Eg ætli mær so at velja tað, sum eg haldi vera rættast og sum er best fyri meg, sigur yngsti borgarin í Svínoy.

### Einki mist

Í dag eru eingi skúlabørn í Svínoy, men fyri eini 50-60 árum síðani vóru tey omanfyri 30.

Sólvá var tó so heppin at kunna ganga í bygdarskúlanum í heimbygdini, heilt fram til 9. flokk. Tá hon skuldu taka 10. flokk, varð tað gjørt við skúlarnar í Klaksvík.

Hóast bygdarskúlin var lítil og avmarkaður í ávísum førum, bar saktans til hjá henni at taka meginpartin av framhaldsdeildini í lokala universitetinum.

- Skúlin hevði alt sum kravdist til 9. flokk, og vit høvdu sama lærara - Jógvan Edmund á Geilini - í øllum fakunum. Eg haldi í øllum førum ikki, at eg havi mist nakað.

Bygdin telist ikki millum tær størstu í dag, men um hetta mundið, tá Sólvá gekk í Svínoyar skúla vóru tey upp í 12 skúlabørn.

- Talið av skúlabørnum minkaði tó nakað, tá ein familja flutti inn aftur til Hvannasunds at búgva, greiðir hon frá.

Seinni fór Sólvá á miðnámsskúla, og tók HF-prógv í 2009. Og nú hevur hon so fast arbeiði á smoltstøðini í heimbygdini.

- Eg havi so einki mist, tekur hon uppaftur.

### Von at vera ein

Onkur vildi kanska hildið, at tað kann ikki vera nógv hjá einum barni at taka sær til her úti í Svínoy. Hesum er Sólvá tó ikki samd í:

- Nei, her var bæði trygt og gott

**» Eg eri kanska eitt sindur spesiell, av tí at eg framvegis búgvi herúti. Men snedig, nei, tað eri eg ikki, tí eingin noyðir meg til tað**

## 3-2 til United

**Sólvá arbeiðir á smoltstøðini í Svínoy. Hesa ársins tíð fer hon avstað í myrkri og kemur aftur í myrkri.**

**Men, fær hon gerandisdagin at ganga? Ella er tað ikki langligt og myrkt at vera her tey longu og myrku vetrarkvøldini?**

**- Tað hevur gingið soleiðis í 24 ár, so tað man fara at ganga eina tíð aftrat, sigur hon brosandi.**

**Dagin fyri at Oyggjablaðið vitjaði í Svínoy var nógv at gera á smoltstøðini, og hon var rættiliga móð tá hon kom til hús. Men hon visti allatíðina, at hon mátti ikki sovna, fyrrenn hon hevði sæð yndislið sítt í enskum fótbólti spæla - Manchester United.**

**- Jú, tað var ein sera spennandi dystur á útivølli ímóti Blackpool. Tonk tær til, - teir vóru aftanfyri 2-0, tá 18 minuttir vóru eftir. Og so megna teir altso at vinna dystin 3-2, sigur ídni United-fjepparin í Svínoy.**